**TIL LEIGU**

250 m² til leigu á 2. hædd í nýggjari høll á Hjalla. Hølini kunnu nýtast til skrivstovu, handil, framsýningar ella annað. Allir nútímans hentleikar eru tøkir. Stórt parkeringspláss hoyrir til leigumálið. Flytast kann inn í januar 2006

*Hevur hetta áhuga vendið tykkum til:*

**P/F Bókahøllin**

Pedda við Stein gøta 9
FO-100 Tórshavn
Tlf. 31 68 63 · Fax 31 96 44
t-post: lararaf@lararafelag.fo

# Kunngerð

**um uttangarðsútskiftingarfund við Gjógv**

Eftir lóg nr. 147 frá 27. mars 1939, seinast broytt við løgtingslóg nr. 110 frá 29. juni 1995, § 79, verður boðað til útskiftingarfund mikudagin 20. apríl kl. 10.30 í Gjáar Samkomuhúsi.

Til viðgerðar verður útskifting av hagapartinum Líðin, matr. nr. 231a.

Nevndarlimir eru Jørleif Kúrberg, Tórshavn og Óluva Joensen, Skopun.

N. v.

Øssur Á. Midjord
útsk.form.

**FØROYA STUDENTASKÚLI OG HF-SKEIÐ**
Hoydalar • FO-188 Hoyvík
Tlf. 312973 • Fax 318624
Teldupostur skrivstovan@hoydalar.fo
Avgreiðslutíð: kl. 8.00-15.00

Treytað av góðkendum undirvísingarvirksemi verða frá 1. august 2005 at rokna **5-7 føst størv** leys at søkja sum adjunktur/lektorur við faksamanseting ætlað til lærugreinaraðið í studentaskúlum og HF-skeiðum. Søkt verður eftir lærarum við hesum lærugreinum:

**danskt, enskt, filmur/sjónvarp, føroyskt, heimspeki, ítróttur, lívfrøði, spanskt, støddfrøði, teldufrøði og týskt.**

Harumframt eru **11-13 ársvikariat** í lærugreinunum:

**alisfrøði, danskt, enskt, franskt, føroyskt, geografi, ítróttur, latín, lívfrøði, samfelagsfrøði, støddfrøði, søga og týskt.** (møguliga saman við eini av lærugreinunum sum nevndar eru undir føstu størvunum).

Umsøkjari, ið ikki hevur lokið prógv í námsfrøði fyri setanardagin, skal taka lut í innleiðsluskeiði í námsfrøði, sum Mentamálaráðið skipar fyri í august 2005 - í viku 32. Nýsett starvsfólk skulu sambært føroyskari kunngerð um námsfrøði hava staðið námsfrøðiliga útbúgving í seinasta lagi tvey ár eftir setanardagin.

Í sambandi við starvsetanina leggur skúlin dent á, at umsøkjarar hava kunnleika um føroyskt mál og føroysk samfelagsviðurskifti, og at umsøkjarar eru áhugaðir í at ogna sær hetta innlit. Skúlin leggur somuleiðis dent á góð samstarvsevni og at umsøkjarar virknir fara at taka lut í menningini av einum góðum námsfrøðiligum skúlaumhvørvi, har samstarv, kunningartøkni og nýggir arbeiðshættir eru týðandi tættir

Gjørt verður vart við tveyárasáttmálan, ætlaður umsøkjarum við vantandi føroyskum málførleika og vantandi kunnleika um føroysk samfelagsviðurskifti. Tað vil siga, at umsøkjarin verður settur í tíðaravmarkað starv fyri tvey ár. Skúlin rindar kostnaðin hjá umsøkjaranum fyri flyting og ferð fram og aftur millum verandi bústað og Føroya Studentaskúla og HF-skeið. Skúlin endurrindar í mesta lagi 30.000 kr. fyri flyti- og ferðaútreiðslur hvønn vegin – gevið gætur – upphæddin er skattskyldug. Ætlar umsøkjarin at halda fram í starvinum eftir tveyáraskeiðið, skal umsøkjarin søkja starvið av nýggjum á jøvnum føti við aðrar umsøkjarar. Áhugaðir kunnu venda sær til skúlan.

Umsøkjarar kunnu fáa meiri at vita um skúlans stevnumið, um teir venda sær til leiðslu skúlans ella kunna seg á heimasíðu skúlans: www.hoydalar.fo

Umsókn á oyðublaði frá YF ella frá GL verður stílað og sent til

**Føroya Studentaskúli og HF-skeið,**
att.: Mads A. Winther, rektari, Hoydalar,
FO - 188 Hoyvík, Føroyar

í seinasta lagi 3. mai 2005.

Avrit av próvtøkuskjølum ella úrskrift úr próvtøkuprotokoll skulu sendast saman við umsóknini. Setanarsamrøður fara fram miðskeiðis í mai.

# Gravarhjálp

*Marknagilsvegur 86 · 100 Tórshavn*
*Tel 311723 - 511723 · Fax 321722*
*herman@post.olivant.fo*

**Vit útinna allar uppgávur í sambandi við eina jarðarferð frá byrjan til enda**

- Eisini sangir, blómur og kransar
- Vit syrgja fyri sangarum *(í Tórshavn)*
- Vit framleiða okkara egnu kistur *(veita um alt landið)*
- Skipa fyri líkflutningi til og úr Føroyum
- Skipa fyri líkbrenning
- Hjá okkum kanst tú bestemma **tín síðsta vilja**

Sosialurin 341800

# Frá Miðvágs/ Sandavágs Skúla

Vegna barnsburðarfarloyvi verður søkt eftir avloysara fyri **reingeringsfólk** við **Miðvágs/Sandavágs Skúla** at byrja tann 1. juni 2005. Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til umsjónarmenninar.

Umsóknir skulu vera

**Hallar- og Skúlanevndini**
v/ Georg F. Hansen
370 Miðvágur

í hendi seinast mánadagin 9. mai 2005.

**Miðvágs-Sandavágs Skúli**

## Óbygd neystagrund

Ognin matr. nr. 813, Fuglafirði, verður við hesum lýst til sølu. Talan er um eina óbygda neystagrund uml. 30 m² til víddar.

Nærri fæst at vita við at venda sær til Advokatskrivstovuna, Fr. Petersensgøtu 9, Tórshavn, att. Óla Jákup Kristoffersen, e-mail ojk@jura.fo ella Elin Svínoy, e-mail els@jura.fo

**Advokatskrivstovan**
Fr. Petersensgøta 9 · Postbox 6 · FO-110 Tórshavn
Tel (298) 31 11 45 · Fax (298) 31 15 25
e-mail: jura@jura.fo · web: www.jura.fo

Sosialurin 341800

# Norðstreymoyar Handverkarafelag

Ársaðalfundur verður á Maskinmiðstøðini í Kollafirði týsdagin tann 19. apríl kl. 17.30.

Um fundurin ikki er viðtøkuførur, verður eykaaðalfundur hálvan tíma aftaná.

**Nevndin**

**Frítíðaravloysarar**

# Manning



Við hesum verður søkt eftir stýrimonnum, maskinmeistarum, dekkarum og kateringfólki til strandfaraskipini.

Freistin at søkja størvini er tann 2. mai 2005.
Sí lýsingina á heimasíðu okkara **www.ssl.fo**

**STRANDFARASKIP LANDSINS**

www.ssl.fo · 34 30 30

REPROZ

**Fyribilsstørv**

# Manning



Við hesum verður søkt eftir skipara og stýrimonnum til Súluna.

Freistin at søkja størvini er tann 21. apríl 2005.
Sí lýsingina á heimasíðu okkara **www.ssl.fo**

**STRANDFARASKIP LANDSINS**

www.ssl.fo · 34 30 30

REPROZ